UTTAN ÚR HEIMI

## Ætla at bjarga toskinum

ES-nevndin hevur nú lagt eina ætlan um at bjarga toskinum á fleiri leiðum, eitt nú Norðsjónum, Skagerak og Kattegat.

Ætlanin umfatar eitt tíggju ára skeið. Um toskastovnin í Norðsjónum sigur nevndin, at nýggju tiltøkini skulu gera, at stovnurin av fullvaksnum toski fer at veksa eini 30 prosent um árið. Stovnurin er í løtuni um 32.000 tons, men skal mennast, so hann í fyrstu atløgu kemur upp á 70.000 tons. Seinni er so ætlanin, at hann skal koma upp á 150.000 tons.

Samstundis hevur ES-nevndin gjørt av at áseta nýggjar reglur, sum skulu skerja veiðitrýstið. Nú er ikki bert talan um kvotur og fiskidagar, tí nú skal maskinorkan hjá tí einstaka farinum eisini hava týdning, tá veiðan skal ásetast.

## Fór uttan um lógina

Skjøl, sum kongresslimurin Henry Waxman hevur lagt fram, vísa, at amerikanska fyritøkan Halliburton hevur havt samhandil við lond, sum verða løgd undir at stuðla yvirgangi, og sum tí eru umfatað av serligum handilstiltøkum.

Tað serliga við Halliburton er, at Dick Cheney, varaforseti var stjóri í felangum frá 1995 til 2000, og skjølini avdúka, at felagið var virkið í fleiri av teimum sokallaðu ivingarsomu londunum júst í teimum árunum.

Henry Waxman hevur ikki sagt, at Halliburton breyt amerikanska lóg við samhandlinum, men hann heldur kortini, at felagið nýtti ymsar snildir fyri at snúgva sær uttan um lógina. Ein talsmaður hjá Halliburton ásannar, at Waxman hevur rætt, men hann leggur dent á, at felagið heldur seg innan fyri lógarinnar karm.

## Fransmenn hjálptu Saddams monnum

Amerikanska blaðið The Washington Post vil vera við, at Frakland hevur hjálpt fleiri av teimum næstu medarbeiðarunum hjá Saddam Hussein at flýggja úr Irak.

Blaðir nevnir eingi nøvn, men sigur, at franskir embætismenn í Sýrialandi lótu fleiri irakum pengar, so teir kundu sleppa av landinum, áðrenn amerikanararnir komu til Bagdad.

Franska sendistovan í Washington avsannar tíðindini í The Washington Post og sigur tey vera tann bera heilaspuna. Colin Powell, uttanríkisráðharri sigur, at hann ætlar sær at kanna tíðindini, men skoytir uppí, at fyribils hevur uttanríkisráðið ongar ábendingar um, at fransmenn týðandi irakum at flýggja úr Irak.

## Kann vera óheppið at eita Sars

Norsku brøðurnir Ernst og Hans Jørgen Sars, sum reka fyritøkuna Brødrene Sars, eru brádliga vorðnir kendir, nú tann herviliga lungnasjúkan SARS ger um seg nógvastaðni.

Hans Jørgen Sars sigur við Bergens Tidende, at nógv fólk steðga á, tá teir koma koyrandi við vøruvogninum, tí navnið Sars stendur á síðuni.

Men Sars-brøðurnir eru ikki teir einastu í Noregi, sum verða settir í samband við sjúkuna. Í fyritøkunu Sars Internationale í Bergen er skilið tað sama. Berit Berntsen, stjóri sigur, at tey fáa fleiri teldubrøv frá fólki um allan heim, sum biðja um upplýsingar um SARS-sjúkuna. Men hesum duga tey ikki at svara, tí Sars Internationale hevur einki við sjúkur ella sjúkukanningar at gera.

Sambært norsku hagstovuni eita 35 norðmenn Sars til eftirnavn.

# Amerikanskt mistak bjargaði Saddam Hussein

**Irakski einaræðisharrin var ikki í húsunum, sum amerikanararnir bumbaðu, men í grannahúsunum.**

IRAKKRÍGGIÐ
*Árni Joensen*

- Amerikanararnir javnaðu hús nummar 7 og hús nummar 9 við jørðina, men Saddam Hussein og næstringar hansara vóru í nummar 11. Eg skilji ikki, hvussu amerikanararnir kundu mistaka seg, sigur Muhammad al-Bana, sum sjálvur býr í somu gøtu.

Álopið á tey bæði húsini í Bagdad var byrjanin til kríggið í Irak. Amerikansk flogfør tveittu fýra serliga sterkar bumbur eftir húsunum, sum vórðu fullkomiliga oyðiløgd. Amerikanskir talsmenn vildu vera við, at bæði Saddam Hussein og næstringar hansara vóru í øðrum húsunum, men seinni viðgingu bretskar fregnartænastukeldur, at einaræðisharrin var sloppin undan álopinum á lívi. Harafturímóti kostaði álopið 14 sivilfólkum lívið.

Mohammad al-Bana sigur, at húsini nummar 11 høvdu staðið tóm í fleiri mánaðir, men at onkur hevði leigað tey nakrar fáar dagar undan álopinum.

-Tað var tey húsini, amerikanararnir skuldu bumba, tí har helt Saddam fund. Ístaðin bumbaðu teir hini húsini, men har búðu vanlig fólk, sum eg kendi, sigur Mohammad al-Bana.

# SARS serliga vandamikið fyri eldri fólk



*Serliga eldri fólk eru í vanda fyri at doyggja, fáa tey SARS*

**Vandin fyri at doyggja av sjúkuni SARS er nógv størri enn hildið, og vandin er størri, tess eldri sjúklingurin er.**

SARS-SJÚKAN
*Árni Joensen*

Kanningar hjá bretskum granskarum vísa, at vandin fyri at doyggja av sjúkuni SARS er nógv størri, enn granskarar higartil hava hildið.

-Vit halda, at tað er 13 prosent sannlíki fyri at doyggja av sjúkuni, um sjúklingurin er niðan fyri 60 ár, men er hann eldri enn 60, er tað millum 43 og 55 prosent sannlíki fyri, at hann doyr, sigur Christi Donnely, professari á Imperial College í London, sum hevur staðið fyri kanningunum saman við granskarum í Hongkong.

Kanningarúrslitið víkir nógv frá tí, sum heimsheilsustovnurin WHO fyrr hevur sagt. Sambært WHO er tíggju prosent sannlíki fyri, at fólk, sum fáa SARS, doyggja av sjúkuni.

# Ferðafólkini í flogfarinum lótu seg úr klæðunum

**Manningin á amerikanska Boeing 727-flogfarinum gav sær ikki far um tað, tá tey 87 ferðafólkini brádliga lótu seg úr hvørjum klodda.**

FLÚGVING
*Árni Joensen:*

Amerikanska ferðaskrivstovan Castaway Travel hevur funnið upp á nakað nýtt. Ferðafólkini skulu flúgva nakin.

Tann fyrsta ferðin av hesum slagnum var nú um dagarnar, tá felagið sendi 87 ferðafólk við einum flogfari úr Miami til meksikanska býin Cancun.

Alt var, sum tað átti at vera, tá ferðafólkini komu umborð og settu seg, og sum vanligt er, loystu tey eisini trygdarseðlarnar, tá flogfarið var komið nakað uppfrá. Men tað var ikki tað einasta, sum tey loystu. Aftan á trygdarseðlarnar loystu menninir buksureimina, og síðani lótu menn og kvinnur seg úr hvørjum klodda. Ikki fyrr enn flogfarið skuldi seta seg aftur, lótu tey seg íaftur.

Donna Daniels, sum eigur Castaway Travel saman við øðrum, sigur, at ferðafólkini eru fólk, sum hava strævið arbeiði og tí líða av strongd. Tey eru eisini ævintýrarar, sum vilja vera frí í frítíðini. Ja, sjálvt ikki klæðini skulu forða teimum í fullkomna frælsinum, sigur hon.

# Tey elta framvegis hjá Gunnleivi

**Tað verður framvegis elt í gamla bakarínum hjá Gunnleivi á Gripsvegnum. Fyrr var tað deiggj, men nú er talan um vøddar. Fysioterapistovan Stimbur hjá Beintu Danielsen er nú flutt inn í kendu býarmyndina í Havn**

FLYTING
*Stefan í Skorini*

Mikudagin lat fysioterapistovan Stimbur upp í nýggjum hølum. Beinta Danielsen, sum eigur og rekur fysioterapistovuna, hevur keypt gamla bygningin hjá Gunnleivi á Gripsvegnum.

Alt virksemið verður nú flutt úr húsinum í Niðarugøtu í Hoyvík, har Stimbur higartil hevur hildið til, oman í gamla bakaríið.Týsdagin var móttøka fyri øllum áhugaðum í nýggju hølunum.

– Vit hava leingi leitað eftir einum nýggjum hølum niðri í býnum, men tað hevur verið sera torført at finna eini hóskandi høli, sum eisini lýkur øll krøvini frá danska heilsustýrinum, sigur Beinta Danielsen.

### Strong krøv

Krøvini eru, at hæddin í hølunum í minsta lagi er hálvantriðja metur, so at inniluftin altíð er nóg góð. Harumframt er tað krav, at viðskiftafólkið ikki skal ganga ígjøgnum trappur fyri at sleppa inn, men hava atgongd beinleiðis frá gøtuni, og triðja kravið er, at privat parkeringspláss eru tøk.

Viðskiftafólkið hjá eini slíkari fysioterapistovu eru í øllum aldrum, og tey flestu verða send higar av kommunulæknanum.

– Sum fysioterapistova skalt tú kunna taka allar sjúklingar í viðgerð, og sjúklingarnir eru alt frá nýføðingum til oldingar, sigur Beinta.

Í løtuni starvast tríggir fysioterapeutar í Stimbri, men um fáar vikur verður ein fjórði settur í starv. Umframt Beintu Danielsen starvast Marjun Zachariassen og Ingilín Holm í fysioterapistovuni, og um nakrar vikur fer Durita Rouch eisini at arbeiða har.

Beinta hevur havt eini hús í Hoyvík, har hon hevði fysioterapistovu í kjallaranum, meðan familjan búleikaðist í ovaru hæddini. Nú hon hevur keypt hendan bygningin, fer familjan eisini at flyta inn í ovaru hæddini.

Upprunaliga húsaðist heimabakaríið hjá Doru kjallaranum, inntil Gunnleiv Mouritsen keypti húsini og bakaríið í 1962. Í 1972 bygdi hann út, soleiðis sum tey síggja út nú



*Beinta Danielsen hevur flutt sítt virksemi í fysioterapistovuni Stimbri úr Hoyvík oman í gamla bakaríið hjá Gunnleivi. Tey elta sostatt framvegis bakarínum, har Gunnleiv fór undir sítt virksemi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Beinta Danielsen mýkir vøddarnar hjá Carolin Pecho úr Týsklandi, sum í løtuni er á starvsvenjing á Sosialinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Kanningar av alduorku lidnar:

# Nógvir møguleikar at troyta

**Tað ber væl til at framleiða streym við alduorku í Føroyum, men av tí at alt enn er á royndarstøði, er framleiðslukostnaður in heldur høgur. Hetta er niðurstøðan av eini kanning av alduorku við Føroyar, sum oljufelagið Agip hevur fíggjað**

ALDUORKA
*Stefan í Skorini*



*Verkfrøðingurin Signar Heinesen hevur staðið á odda fyri arbeiðsbólkinum, sum hevur kannað møguleikarnar fyri at framleiða streym við alduorku í Føroyum, og hann slær fast, at tað eigur at bera til, men nógvir knútar eru at loysa, áðrenn tað ber til at gagnnýta alduorku til fulnar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Seinasta árið hevur verkfrøðingurin Signar Heinesen frá Data Quality staðið fyri einum arbeiðsbólki, sum hevur kannað møguleikarnar fyri at gagnnýta alduorku í Føroyum. Kanningin er nú liðug, og úrslitið lagt fram á tíðindafundi. Luttakararnir í hesi kanning hava verið frá Agip, Wavegen, Data Quality, Landsbyggifelagnum og SEV.

Oljufelagið Agip hevur latið eina millión krónur til kanningina, og er hetta ein partur av teimum tíggju milliónunum, sum oljufelagið hevur bundið seg til at lata til førleikamenning í Føroyum.

### Eiði og Søltuvík

Kanningin vísir á tveir hættir at framleiða streym frá alduorkuni kring Føroyar. Annar mátin er at stoypa eina støð, sum munnar nakað út í sjóvarmálan. Lufttrýstið frá aldunum setir síðani gongd í turbinurnar. Hin hátturin er at spreingja tunlar inn í bergið og seta turbinur upp inni í tunlunum.

Kanningin vísir á tvey áhugaverd øki í Føroyum, har royndarstøðir kunnu setast upp. Hetta er á Eiði og í Søltuvík.

Kanningin vísir á møguleikan at stoypa eina støð nær Mølini á Eiði. Hendan er av tí slagnum, sum munnar út í sjóvarmálan. Tað er tó sera trupult at byggja eina slíka støð á einum útsettum stað. Samstundis sum brimið skal gagnnýtast, er tað ein meinbogi.

Hetta fekk limirnar í arbeiðsbólkinum at hugsa um aðrar møguleikar, og skotið varð upp at bora tunlar í berginum. Í kanningini verður upp til at bora tunlar millum Søltuvík og Salthøvda á Sandoynni.

Kanningin ger sær eisini eina meting av, hvussu nógv slíkar støðir fara at kosta. Støðin á Eiði kostar umleið 10 milliónir krónur at byggja og mett verður, at hon kann framleiða 800.000 kilowatt tímar um árið. At bora tunlarnar í Søltuvík fer sambært kostnaðarmetingini at kosta umleið 17 milliónir krónur, og hetta verkið kann framleiða 1.300.000 kilowatt tímar um árið.

– Hetta eru ikki tær heilt stóru upphæddirnar vit tosa um, og tí kundi tað verið áhugavert hjá Oljumálaráðnum og SEV at kanna hesar møguleikar nærri, sigur Signar Heinesen.

SEV og Oljumálaráðið fara í næstum at viðgera úrslitini av kanningini og finna fram til, um hesar royndir skulu stimbrast ella jarðast. Tað fara tó at ganga fleiri ár, áðrenn ein slík verkætlan kann setast í verk.

Kostnaðurin at framleiða streym við alduorku er hægri enn at framleiða streym við vatnorku, sum vit nýta nógv nú. Vatnorkan telur umleið 40 prosent av samlaðu nýtsluni í Føroyum.

– Vit skulu minnast til, at hetta enn er á royndarstøði, og tí kanst tú ikki samanbera kostnaðin av hesum báðum, sigur Signar Heinesen, og hann leggur afturat, at enn er tað einki, sum sigur, at hetta ikki ber til.

### Trupulleikar við alduorku

Felagið Wavegen í Skotlandi, sum granskar nógv í alduorku, hevur verið við í hesi verkætlanini. Wavegen fær granskingarpening frá ES til sínar royndir.

Bara eitt alduorkuverk er í øllum heiminum í løtuni, og tað er á oynni Islay í Skotlandi. Hetta er tað næsta alduorkuverkið, sum Wavegen hevur sett upp har. Trupulleikar eru tó við verkinum, sum ikki framleiðir nóg støðugt, tí tað liggur á ov grunnum vatni.

At framleiða streym við alduorku er tí enn á byrjunarstøði, og allar royndir við hesi orku kunnu vera virðismiklar hjá granskarum í framtíðini.